# GLUGGAGLÆMA í Norðurlandahúsinum

GLUGGAGLÆMA
*Frits Johannesen*





Trúgvar sum trøllið hava Randi Vang og Jónhild Johannesen verið móti føroyskum listahandverki, føroyskari list og sniðgeving. Ótroyttiligar hava tær fingið í ljósmála hesi listaligu eyðkenni við sýningum. Viljin drívur verkið, og teirra intuitiva hugsan hevur givið seg til kennar í hesi søk. Lýst føroyska list, "brúkslist" og sniðgeving í sýningum, sum tær hava lagt til rættis, ikki bert her á landi, men eisini uttan fyri landoddarnar t. d. í Hetlandi og Íslandi.

Flestu tjóðir hava siðvenju í brúkslist. Ja, tað eru mong listafólk, ið hava fingið íblástur úr brúkslistini. Hava brúkt hetta sum tekn og spor í listaligum skapum í útskeringum, prýðum, lutum og myndlist. Hetta er íblástur frá eini listaligari fatan, sum hevur fleri túsund ára royndir.

### Brúkslist

Snið og skap varð lagt í útskeringar prýðislutir, amboð, útbúnað, hús, búnýti, leikur og klædnapløgg. Hugsi, at hetta liggur so djúpt í mannasálini, at urmenniskja vekir í hesum skapum. Hetta er sera spennandi at nema við, tí vit koma so tætt uppat tí huglag, sum er lagt niður í okkum at skapa og gera við. Ymiskt er tað frá fólki til fólk – frá tjóð til tjóð, hvussu hesi skap hava sæð út. Frumfólkið í Australia hevur kringin, sum gongur aftur í teirra myndagerð. Tað kenst eins og listin gongur í einum kringi. Vit kundu sagt, at nútíðarlist fær sítt endurskin úr frumlistini. Onkursvegna hevur mangt og mikið í listini fest røtur í einum uppruna, sum fevnir um allan kringin. Tað, sum hendur og hugflog hava skapað, er ein ferð á einum tíðarleysðum havi, sum er ogn hjá mannættini. Vit kunnu t. d. undrast yvir at fólk, sum hava livað undir trongum korum og í skarðlendi, hava havt orku til at skreytprýða amboð, búnýti og klæði so kynstriga eins og grønlendingar hava gjørt tað. Ísur og kavi hevur verið um hetta fólk í eini 5000 ár – kanska meir, og hóast tað, so hevur fólkið dugað at tilevna reiðskap úr steini og beini – veitt moskusoksar, reinsdjór, roysningar, bjarnir, kóp og hval við hesum amboðum. Hetta er at undrast yvir og tað afturat, at orka var til tað andaliga og tímiliga at leggja listalig spor í tað, sum hetta fólk hevði um hendi. Síggja vit ein tupilakk ella eina amulett, steðga vit á og undrast, tí tað listaliga myndar ein lívsvilja og eina lívsmegi, sum kemur til sjóndar í hesum skapum og linjum. Tað var neyðugt hjá teimum at skapa myndir, sum tulkaðu ta andaligu tilveruna. Vit kunnu siga, at listin myndast undir neyðsyntum umstøðum. Hugsi flestu listafólk taka undir við hesum.

### Gluggaglæma í Norðurlandahúsinum

Markið millum brúkslist og myndlist, nema vit ikki við her á hesum sinni, men tá ið eg sá Gluggaglæmu í Norðurlandahúsinum nú um dagarnar, hugsaði, hvussu hegnisliga hetta var gjørt. Fór ígjøgnum ta tóma rúmi á eini breyt, sum leiddi teg um myndlist og sniðgevning. Hetta var stak forvitnisligt. Grafikkur hjá Ogga Lamhauge og Jónu Rasmussen vóru eins og hellumyndir í hesum Norðurlandahelli, og á gólvinum var Guðrið Poulsen við sínum tekkjuligu, keramisku sporum, sum loftaðu grafikkinum og sniðgevingini. Smáu keraldini á gólvinum leiddi teg aftur til frumhellið, har íløtini søgdu og siga sína søgu um menniskju, sum royndu at lívbjarga sær undir torførum umstøðum. Ikki so sjáldan stinga hesi leikapetti frá hesum døgum kríllin undaná onkrum øskudunga um tann víða heim og siga sína søgu um mannaættina í smáum pettum. Hetta var væl valt at lata hesar smáu, teskandi dygdarlutir røra seg á gólvinum.

### Norðurlandahúsið sum helli

Norðurlandahúsið er helli, sum dregur flóð av ljósi at sær. Tað skiftandi ljósið, sum fer um Havnina og Kirkjubøreynið, tekur hendur saman um tað, sum er innandura. Í hesum ljósspæli sóust vakstrarløg í skulpturellari sniðgeving út móti ljósinum har t. d. skraddarar og sniðgevarar lótu hesa løtu í ein dreym av undurføgrum klædnapløggum, sum leiftraðu í hesum himmalska ljósi. Tað var væl gjørt, at skraddarar og sniðgevarar tóku hendur saman og myndaðu hesa løtu í samanspæli millum partarnar t. d. Marita S. Sigurðardóttir, skraddara og Inga Maria Vang, sniðgeva. Ása Hátún loysti ur lagdi syngjandi skulpturar uttast við í einum ljósum króki í lampuskermum úr samfingnari skinnull. Peran fer onkran dag at geva hesum skermum lív innanífrá, men her var lívrunnið ljós kring hesar elskuligu skermar av Kirkjubøreyni. Er tað ikki himmalskt? Ása og t. d. Tita Winther (vev) hava í ár so mong verið í hesari verð eins og summarfuglar á hásumri. Hetta er teimum til mikla tign og miklan sóma. Góð orð kunnu sigast um alt, ið sýnt varð fram.



### Hendur, sum skapa

Nú røkka okkara skapandi hendur í sniðgeving út í tann víða heim – so langt sum til Tokiu, Milano, London og París og hugsast kundi, at vit her lótu teimum, sum gingu undan ein munandi styrk á onkran hátt. Tingið kundi tikið upp til viðgerðar t. d. broytt frítíðarlógina, so tað bleiv rúmligari í hesi lóg til tey, sum ár um ár brúka sína frítíð at stíla fyri. Ein dag so troyttast íbirtarnir og fera undir okkurt annað, sum er meira lønandi, men spell er at glæman av tí ljósa degi t. d. í brúkslistini og sniðgevingini, ikki orka meira av væntandi stuðli í oyrum og krónum, og ikki at tala um tey, sum stilla út, sum elska at lata úr hondum hesi skap. Tað má vera soltið mangan.

Skapandi megi føroyinga vantar ikki. Sannleikin finst í tí ytra, fyri at varðveita hetta, verður tað endurgivið í skapum og sniðum. Hetta málið rørist og nørist í tí tóma rúminum. Tað skapandi málið er í myndum, brúkslist, málningum, grafikki, keramikki, klæðum, sniðgeving, vevnaði og tøving. Eingin ivi er um hetta. Í hesum døgum er Gluggaglæma – »lygnir í sjónum« til skjals í Norðurlandahúsinum, sum vert er at hyggja at.